# Tøkk



Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá ið mín/okkara elskaði sonur, beiggi, svágur, mammu- og pápabeiggi, ommu- og abbabeiggi

**Richard Hvidbro**

so brádliga varð tikin frá okkum.
Tøkk fyri kransar og blómur, til talara, berarar og tøkk øll tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Mamma, Jóhanna, Dorius, Súsanna og Ólavur**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



*Eyðbjørn Jacobsen (h.m.) saman við Jákupi Nolsøe, leiðara á Sjúkraflutningstænastuni*

# Eyðbjørn givin sum portørur

Mikudagin 2. januar var hátíðarhald hjá portørunum á Landssjúkrahúsinum í sambandi við at ein av portørunum Eyðbjørn Jacobsen, ella Eyðbjørn á Kamarinum sum hann eisini verður nevndur, hevði 40 ára starvsdag og sín seinasta arbeiðsdag.

Umframt at vera portørur í 40 ár er Eyðbjørn eisini kendur sum instrukørur í fyrstuhjálp og frá sang- og tónleikabólkinum "Tey av Kamarinum".

Tá Eyðbjørn varð settur í starv sum portørur tann 1. januar í 1968, vóru teir fimm portørar á Landssjúkrahúsinum og ein ambulansa. Teir arbeiddu í vaktarskipanum og høvdu ábyrgdina av sjúkraflutninginum alt samdøgrið allar dagar í vikuni. Eyðbjørn var eisini í fleiri ár ein av vaktleiðarunum hjá portørunum.

Umframt sítt arbeiði sum portørur varð Eyðbjørn í 1975 sendur av Reyða Krossi til Danmarkar at útbúgva seg til instruktør í fyrstuhjálp. Í eini 25 ár undirvísti hann í fyrstuhjálp, bæði á kvøldskúlanum, sjúkrasystraskúlanum og aðrastaðni við.

Eyðbjørn er eisini kendur sum gittarleikari í bólkinum "Tey av Kamarinum", har hann síðan 1955 hevur spælt saman við systkjum, familju og øðrum. "Tey av Kamarinum" hava hesi meira enn fimmti árini givið út nógvar plátur og fløgur, sum eru vorðnar kendar um alt landið.

Eyðbjørn er í dag 67 ára gamal, nú hann hevur lagt frá sær á Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum.




# »Ársins Fyrstuhjálpari«

Reyði Krossur Føroya sóknast eftir evnum at heiðra sum "Ársins Fyrstuhjálpari 2007".

Tann, sum verður kosin "Ársins Fyrstuhjálpari 2007", fær heiðursbræv frá Reyða Krossi Føroya og eina peningagávu, ið Tryggingarfelagið Føroyar letur.

Tann, sum er í uppskoti, skal í farna ári á serligan hátt hava givið kropsliga ella sálarliga fyrstuhjálp. Endamálið er ikki einans at tilnevna "Ársins Fyrstuhjálpara 2007", men eisini at eggja øðrum til at læra seg fyrstuhjálp, so fleiri mannalív kunnu bjargast.

Politi, bjargingarfeløg, virkir, stovnar og einstaklingar kunnu lata inn uppskot, ið verða viðgjørd av nevndini í Reyða Krossi Føroya.

Serligt oyðublað, ið er sent politistøðunum kring landið og annars, fæst frá Reyða Krossi, verður at senda Reyða Krossi Føroya í seinasta lagi 31. januar 2008. Adressan er: Bryggjubakki 10 (postboks 1015) FO 110 Tórshavn.

Ætlanin er at tilnevna "Ársins Fyrstuhjálpara 2007" mánadagin tann 11. februar 2008.